## DAGSINS MEINING

# Vitjan av uttanríkis-máláraðharra

Vitjan av donskum uttanríkisráðharra er ein hending av stórum politiskum týdningi. Spurningurin um størri heimildir á uttanríkis- og verjuøkinum er sera aktuellur, og ósemjan um lógaruppskotið hjá donsku stjórnini um uttanríkispolitiksu heimildirnar er endað í kreppulíkari støðu millum forsætismálaráðið og løgmansskrivstovuna. Partarnar standa langt frá hvørjum øðrum og danska stjórnin hevur gjørt landsstýrissamgonguni eina bjarnatænastu við at leggja grønlendsku heimildarlógina fyri Fólkatingið, hóast áheitan frá løgmanni og føroysku fólkatingsmonnunum um at bíða. Við hesum hevur danska stjórnin eftir øllum at døma við beráddum huga sett grønlendingar og føroyingar upp ímóti hvørjum øðrum. Hetta er donsku stjórnini til lítlan heiður.

Landsstýrið eigur ikki at góðtaka donsku harraboðini um uttanríkispolitisku heimildirnar - vit kundu eins væl sagt væntandi uttanríkispolitisku heimildirnar. Tað ber ikki til at góðtaka nakað, sum bert minnir um eitt afturstig á sjálvstýrisleið. Er minsti ivi, so má hetta mál endursamráðast. Men tað verður alt annað enn lætt, tí eitt gott úrslit fyri Føroyar, vil merkja, at Grønland verður verri fyri enn vit. Danska stjórnin hevur forklutrað og gruggað hetta mál so til, at tað verður sera trupult at finna fram til eina loysn, sum allir partar kunnu vera nøgdir við. Løgmaður eigur at nýta høvið við vitjan uttanríkisráðharrans at gera honum púra greitt, at vit ikki lata okkum slíka viðferð lynda. Løgmaður eigur vinarliga at greiða uttanríkisráðharranum frá, at her býr ein tjóð, sum er farin inn á sjálvstýrisleið og at vikið verður ikki frá hesi kós. Breið tjóðskaparlig semja er um hesa kós, og kann tað tí ikki góðtakast, at danska stjórnin á stívrendan hátt hóttir hesa breiðu semju. Semjan er í stóran mun tengd at nøktandi úrslitum. Um danska stjórnin nú framhaldandi ger seg so ómøguliga og tvøra, at sjálvstýristilgongdin steðgar, so hevur stjórnin við hesum átikið sær politisku og moralsku ábyrgdina av, at breiða tjóðskaparliga semjan í Føroyum støkkur sundur. Vitjanin hjá uttanríkisráðharranum er eitt gott høvi at byrgja fyri hesi vanlukku gongd og eigur vitjanin at verða nýtt til tess at fáa málið alt aftur á kósina.

Annars er endamálið við vitjanini sambært danskar netavísir at undirskriva samstarvsavtalu um uttanríkismál. Hetta er eitt sindur ørkymlandi, men tykist, um farast skal eftir donsku pressuni einki beinleiðis at hava við lógaruppskotið um uttanríkispæolitisku heimildirnar at gera. Hetta snýr seg meira um ítøkiligt samstarv umvegis donsku sendistovurnar og á donsku sendistovunum. Í øðrum lagi fer ráðharrin at kunna løgmann og løgting um uttanríkispolitisku støðuna sum heild. Slíkt kann bert vera gott og gagnligt. Vit bjóða uttanríksiráðharranum vælkomnum til Føroya og ynskja honum eina góða vitjan her og fara annars at venda aftur til vitjanina, um tørvur verður á viðmerkingum til avtaluna, sum varð undirskrivað í gjár, týsdagin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Mammografi?

**Tað er helst ongin yvi um, at screening við mammografi undir framkomnum og dyggum umstøðum kann bjarga kvinnulív. Spurningurin er so um hesar umstøður eru í Føroyum.**



**Jákup Petersen**
*yvirlækni*

*Hvussu fungerar mammografi screening (skrining)*
Seinastu tíðina er farið fram eitt orðskifti um nyttuna av heilsukanning av bróstum, eisini kallað mammografi screening. Hetta er ein røntgenkanning av bróstum hjá øllum kvinnum í einum ávísum aldri við atliti til, at finna álvarsligar broytingar í bróstunum so tíðliga, at viðgerðin gerðst lættari og møguleikin hjá kvinnuni at yvirliva økist.

Tað er sostatt gjørligt við screening at ávísa krabbamein, sum ikki gevur symptomir. Í ávísum førum er tað eisini gjørligt, at ávísa broytingar sum koma áðrenn tað gerðst illkynjað. Summar krabbameinssjúkur kunnu tá viðgerðast meira effektivt, og sjúklingarnir kunnu vænta, at liva longri. Um so screeningin hevur nyttu ella ikki sæst við, at færri doyggja av hesum krabbameini.

Screening merkir sostatt, at ein kannar frísk fólk fyri krabbamein, sum higartil ikki hevur givið symptom. Av tí at screening eisini hevur negativ hjáarin, verður hon ein balansu gongd millum møguligar fyrimunir og vansar. Fyriuttan screening fyri bróstkrabba, er screening fyri tarm- og lívmóðurkrabba eisini nokkso vanlig, meðan ætlaðu screeningarnar fyri prostata- og lungakrabba ikki hava víst seg, at nytta verið stórvegis.

Kanningar sum hava til endamáls at finna krabbamein týðliga millum borgarar, sum ikki hava symptom, hava bert meining um kanningarnar eru tryggar og bíligar, og um viðgerð kann bjóðast. Úrslitið av viðgerðini skal eisini geva størri møguleika fyri bót og betring enn um hon varð givin eftir at sjúkan hevur givið symptom. Tað vísir seg, at undir ávísum fortreytum og umstøðum, so er screening fyri bróstkrabba ein góð metoda.

Og tað er ikki uttan orsøk, at hugsað verður um atgerðir á hesum økinum. Krabbamein í bróstinum er vanligasti krabbameins formurin hjá kvinnum. Statistiskt roknað doyggja eini 4 – 6 kvinnur árliga í Føroyum av hesi sjúku.

*Fyrireikingar og kanningarúrslit higartil.*
Screening fyri bróstkrabba við mammografi er helst tann best kannaða screenings metodan. Umleið 10 lutakast royndir eru nú gjørdar, harav 5 eru gjørdar í Svøríki. Longu í 1986 gav svenska heilsuskipanin ráð um, at screena kvinnur við mammografi. Hetta varð grundað á svensku kanningarúrslitini tá. Í 1996 varð stovnað ein sokallaður ekspert bólkur at taka sær av samskipanini av virkseminum. Og hetta varð fjølbroytt. Viðurskifti sum ábyrgdarspurningar, innkallingar rutinur, luttøkutal, móttøka og information, aldursmark, kanningartýttleiki, teknisk viðurskifti og dygdarkontroll vóru viðgjørd. Ekspert bólkurin kom tó skjótt eftir, at dygdar- og trygdarspurningar vóru alt avgerandi.

Screening við mammografi førir við sær, at kvinnan sum oftast fær sína diagnosu fyrr, og á henda hátt fær eina lagaligari viðgerð og betri møguleika fyri at gerast frísk. Fyri tær flestu kvinnurnar gerð kanningin, at tær kenna seg tryggar. Men fyri nakrar vekja kanningarnar órógv. Tá mammografiin er ivasom krevjast fleiri kaningar og til tíðir skurðviðgerð fyri at vita, um tað er illkynjað ella ikki.

Tann økti møguleikin sum nú er, at finna heilt smáar krabbameins broytingar, og eisini broytingar sum koma áðrenn tað illkynjaða tekur seg upp, hevur tó ikki víst seg bert at hava nyttu við sær. Tað førir eisini við sær, at kvinnur sum annars aldri skuldu fingið diagnosuna bróstkrabba, í styttri ella longri tíð, fáa eina viðgerðarkrevjandi og hóttandi diagnosu hefta á seg.

*Ymisk úrslit í ymiskum londum*
Nú eru tær svensku kanningarnar eisini vornar mettar samlaðar. Umleið 9 ár eftir at tær byrjaðu vístu hesar kanningar at deyðiligheitin varð fallin 24% í screenings bólkinum í mun til kontrollbólkin. Eitt sindur ymiskt varð í teimum ymisku aldursbólkunum. Millum kvinnur í aldrinum 40 – 49 ár fall deyðiligheitin við 10%, meðan fallið varð 28% fyri kvinnur í aldrinum 50 – 59 ár og heili 31% fyri kvinnur í aldrinum 60 – 69 ár. Fyri kvinnur í aldrinum 70 – 79 varð fallið einans 2%. Hetta er samanumtikið tó eitt so mikið stórt fall í deyðiligheit, at nyttan verður mett, at verða væl størri enn vansarnir, serliga í bólkinum 50 –69 ár. Hav tó í huga, at hetta er støðan, tá screening við mammografi verður gjørd í tí svensku skipanini.

Kanningar í New York og Edinburgh styðja lutvís svensku kanningarnar, meðan Kanada ikki kundi finna nakað fall í deyðiligheit hjá kvinnum í aldrinum 50 – 59 ár. Harafturat vísti kanadiska kanningin at deyðiligheitin millum kvinnur í aldrinum 40 – 49 ár vaks við 14% eftir mammografi screening.

Úrslitini frá mammografi screeningum fra einstøkum londum er nú tøk, og vísir eitt sindur blandað úrslit. Í Nijmegen í Hollandi (miðdepil fyri útbúgving mammografi screeningum í Europa) varð ongin nytta at síggja, og í Onglandi varð einans eitt lítið fall í deyðiligheitini. Samstundis kemur ein rapport úr Kopparberg-Østergøtland í Svøríki, sum vísir stóra nyttu av screening. Og hvussu skulu vit tolka alt hetta?

Nógv bendir á, at tað er dygd og rættur aldursbólkur sum kann verða alt avgerandi. Mammografiin stendur ikki einsamøll. Kanningar av bróstkrabba innibera eisini ultraljíð og sokallaða fínnálsbiopsi, har vevnaður við tunnari nál verður tikin úr tí illgrunasama økinum og sendur til nærri kanning. Harafturat kemur so at bróst kunnu kannast við magnetskannara og at serlækni eftir at hava kannað sjúklingin og sæð kanningarnar skal gera eina meting. Og her ræður um, at tað er dygd í allari ketuni.

Svøríki liggur sum sagt á odda í heiminum, tá tað kemur til mammografi screeningar. Ársøkin til teirra góðu úrslit liggur eisini í, at øll screeningin er umgyrd av dygd og kontroll. Øll stigini í screeningini eru gjølla gjøgnumgingin. Starvsfólk hava fingið serútbúgving og tólini fingið serliga profilering móti mammografi, og tað er eitt skipað eftirlit við allari kanningar- og viðgerðarketuni Haafturat er tað teirra royndir, at skipanin riggar best um

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.